# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hákuni

### til áminningar

**f. 20. sept. 1927 d. 27. des. 2004**



Hendan dagin millum jólanna var ilskligt á Kongaminni. Rópti á seyðin, men ærnar vildu ikki koma nær, stóðu bert og slotaðu, tann fremra av teimum trampaði dúgliga, men ikki at bjóða til, at fáa tær at koma nærri. Og gæsnar hildu seg langt vekk. Her var bara ein kaldur ófrættadámur í skýmingini hendan vetrardagin yviri á Kongaminni. Hugstoytt var at fara oman aftur gøtuna og ikki at hava heilsað rættiliga upp á hvørki fæ ella fenað. – Helst mundu tey gruna, at her ruggaði ikki rætt – tey høvdu hvørki sæð ella hoyrt hirðan í longri tíð, og nú stóð ókunnugmaður har og royndi at kalla tey til sín.

Mong fetini hevur tú gingið hesa gøtuna og neyvan finst tal á tí fæi og fenaði, sum tú hevur alt á hesum grøna bletti har mitt í høvuðsstaðnum. Og mong góð løtan er at minnast á, tá ið hesar lystiligu krásir savnaðu familju og stóra vinaskara tín kring búgvin borð á Traðavegnum. Har vórðu orð havd á munni, sum goymdu miklan fróðskap. Har var frøi og skemt, og har varð sagt frá søgum og hendingum, sum kundu vekja miklan látur. Føroya Fólks Sangbók var altíð í hásæti – tú dugdi hana raðið, sangari og kvøðari var tú sum fáur, og sangurin og kvæðini vóru høgt í metum. Og altíð var hitt góða orðið har onkunstaðni. Heim tykkara var føroysk mentan, tá ið hon blómar.

Og nú hvílir tú undir moldum – skjótt er Harranum um.

Ikki ber til at lýsa saknin og sorgina í orðum, men í hjørtum okkara eigur minnið um teg ævigan bústað. Førningur tín var, hóast hvørki skart ella skreytir, so ómetaliga stórur. Tú var vísur maður í orðsins rætta týdningi, og alskur tín til land okkara og alt tað, sum her livir og andar, bar av øllum. Vit, sum eftir sita og onkursvegna varða av tær, skulu royna at fjálga um tað, ið tú gavst okkum, og hóast tað kann kennast møtimikið at ganga leiðina, nú tú ikki ert at vegleiða og stuðla, so skulu vit royna eftir førimuni at førka førningin víðari fram á vegin – minni tínum til æru og sóma.

Við virðing og djúpari sorg drýpa vit høvur í tøgn og lýsa frið yvir minni tínum.

**Vit Oman Eið**

### Til minnis um

## Mikkjal Páll Hovgaard

Fríggjadagin 28. mai 2004 andaðist Mikkjal Páll Hovgaard í Havn 35 ára gamal.

Hóast nakrir mánaðir eru farnir síðan Mikkjal Páll fór hiðani, vil eg fegin festa nøkur orð á blað til minnis um ein góðan fyrrverandi starvsfelaga.

Mikkjal Páll var ættaður úr Hovi, sonur Ásu og Poul Hovgaard.

Liðugur við 10. flokk sigldi hann eina tíð, til hann sum 18 ára gamal kom til Havnar at arbeiða í 1987.

Hann hevði stóran áhuga fyri bilum og arbeiddi eitt ár hjá Bilfríðkan við Velbastaðvegin, áðrenn hann fekk starv hjá Super Dekk Service við Hoyvíksvegin, har hann í fleiri ár arbeiddi við dekkum og við útmáting og sporing av bilum.

Mikkjal Páll var sera nærlagdur í sínum arbeiði, var ein róligur og avbalanseraður maður, leyp ongantíð fram av, men vísti eitt serligt tol og úthaldni - eginleikar sum komu honum til góðar, tá hann seinni gjørdist sjúkur.

Hann mátti gevast hjá Super Dekk Service, tá hann bleiv sjúkur í rygginum í 1995.

Frá 1996-99 gekk Mikkjal Páll á Føroya Handilsskúla, har hann tók FHS- og hægri handilsskúlaprógv.

Á heysti 1999 varð staðfest, at hann var álvarsliga sjúkur í lungunum, og í februar 2000 fór hann gjøgnum eina stóra skurðviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmanna-



havn, tá bæði lunguni vórðu skift út.

Tað tók honum langa tíð at koma ordiliga fyri seg aftur. Hann kom seg nøkulunda, men bleiv so aftur sjúkur, og á sumri 2003 mátti hann aftur gjøgnum eina stóra skurðviðgerð, tá høgra lunga aftur bleiv skift út.

Mikkjal Páll var leingi bundin at koyristóli við eini iltfløsku settari til. Hann fekk ein sergjørdan bil, og hann kláraði seg væl og kundi fylgja við í tí, sum hann hevði áhuga fyri.

Mikkjal Páll var giftur við Gunvá Mortensen av Eiði, tey fingu synirnar Jógvan Eli, og Pól Ása, sum eru ávikavist 6 og 8 ára gamlir. Gunvá er útbúgvin lærari og arbeiðir í Sankta Fransskúla í Havn.

Hesi árini Mikkjal Páll var sjúkur, var ein torfør tíð fyri familjuna. Gunvá mátti leggja lærarastarvið frá sær eina tíð, og saman við dreingjunum búði hon ein stóran part av tíðini á Hotel Torshavn, meðan hann lá á Ríkissjúkrahúsinum. Tíðin var eisini eitt prógv um gott samanhald í familjuni.

Hóast Mikkjal Páll var álvarsliga sjúkur, var hann ein savnandi miðdepil millum føroyingarnar á Ríkissjúkrahúsinum.

Hann var viljasterkur og sat ikki og kúrdi, men fylgdi væl við, hvussu aðrir føroyskir sjúklingar høvdu tað, hann prátaði við øll og var opin og erligur um sína egnu sjúku. Hetta gjørdi, at hann fekk nógvar vinir og var ein góður stuðul hjá øðrum sjúklingum.

Tað eru nokk fleiri sum minnast Mikkjal Páll frá eini sending í Sjónvarpi Føroya í 2003, í samband við at Kristnastova í Keypmannahavn fylti 30 ár, tá leiðarin, Øssur Berghamar, vitjaði familjuna á eini sjúkrastovu á Ríkissjúkrahúsinum.

Fríggjadagin 28. mai 2004 andaðist Mikkjal Páll á Landssjúkrahúsinum.

Friður veri við minninum um Mikkjal Páll Hovgaard.

**Fyrrverandi starvsfelagi**

Klivin, SMS:

## Dreymurin gjørdist veruleiki

**Hósdagin 27. januar fekk mótahandilin Klivin í SMS nýggjar eigarar. Heibrith Jacobsen og Vagna Sørensen hava yvirtikið handilin frá Katrin í Gongini, sum stovnaði Klivan fyri 17 árum síðan**



*Heibrith Jacobsen og Vagna Sørensen hava yvirtikið mótahandilin Klivan frá Katrin í Gongini, sum hevur átt og rikið handilin seinastu 17 árini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Heibrith Jacobsen og Vagna Sørensen í Havn hava yvirtikið mótahandilin Klivan frá Katrin í Gongini, sum hevur átt og rikið handilin seinastu 17 árini

Klivin er ein mótahandil, ið selur kvinnuklæðir av kendum merkjum sum t.d. "Munthe Plus Simonsen", "Stella Nova", "Sant Tropez", og "Day", alt donsk mótaklæðir.

Heibrith hevur arbeitt í Klivanum síðan 1993, meðan Vagna arbeiddi har frá 2002 til 2004.

Heibrith Jacobsen sigur, at hetta er spennandi avbjóðing. Tær báðar, Vagna og hon, hava ofta tosað saman um at tað hevði verið stuttligt at keypt handilin, um Katrin fór at selja hann. So hetta er ein dreymur, sum nú gjørdist veruleiki.

Heibrith sigur, at tað er ein fyrimunur, at hon hevur arbeitt so nógv ár í handlinum og hon kennir viðskiftafólkini og leverandørarnar.

Hon sigur eisini, at hon hevur lært nógv av Katrin, tær hava t.d. keypt inn saman, og hon hevur altíð verið góð í ráðum.

Ein av komandi døgunum verður móttøka fyri nýggju eigarunum í Klivanum.